FBS Steypakappingin

Hálvfinalur og finala vórðu leikt um vikuskiftið, og tá avtornaði hevði Símin Lassaberg saman við øðrum sterkum bridge nøvnum tryggjað sær heitið sum steypavinnari

BRIDGE
Bogi Simosnen/Arnbjørn Sivertsen

Hálvfinalurnar og finalan í steypakappingin vóru leiktar í Lonini í Fuglafirði leygardagin. Spæld vóru 40 spøl bæði í hálvfinalunum og í finaluni.

Úrslitini vóru hesi:

Hálvfinalurnar
Marjun Restorff – Magni Jøkladal 135 — 112 imp
Símin Lassaberg– Carl Mikkelsen 133 — 50 imp

Finalan
Símin Lassaberg – Marjun Restorff 105 — 63 imp

Á vinnandi liðnum saman við Símin Lassaberg leiktu eisini Rói á Rógvu Joensen, Marner Joensen og Árni Dam, kend føroysk bridgenøvn, sum allir hava spælt á landsliðnum fleiri ferðir.

Í mai skulu hesir umboða Føroyar í norðurlendsku kappingini fyri steypavinnarar í Rottneros í Svøríki. Vit ynskja teimum tillukku við sigrinum í steypakappingini og góða eydnu í Svøríki.

Vit skulu síggja eitt spæl frá hálvfinaluni, har Rói hegnisliga vinnur 3ut.

S/ -		
	Q103	
	K987	
	9743	
	43	
J97		K62
AJ104		52
105		KJ82
Q1076		983
	A854	
	Q6	
	AQ6	
	AKJ2	

NS: Símin Lassaberg — Rói á Rógvu Joensen
EV: Carl Mikkelsen — Arnbjørn Sivertsen

V	N	E	S
-	-	-	2kl
pass	2rú	pass	2ut
pass	3kl	pass	3sp
pass	3ut	pass	pass
pass			

2kl: Krav.
2rú: Relé.
2ut: 20-21 hp.
3kl: Baron — leitar eftir 4 litum.

Kontraktin vann eisini við hini borðini, men har fekk spælførarin hjálp í útspælinum. Hjartari ella kleyvari út ger tað lættari fyri spælføraran.

Carl spældi rú 10 út, sum gingu runt til frúnna. Rói spældi spaðara til tíggjuni, sum Arnbjørn tók við konginum og spældi kl 9 aftur. Rói tók við essinum og spældi hj 6, Carl dekkaði við tíggjunum, og Rói tók við konginum. Frá borðinum spældi hann síðan hjartara til frúnna, sum Carl tók við essinum og spældi rútara aftur til áttuni og essið. Rói tók nú sp A og sp Q, og støðan var hendan:

	-	
	98	
	97	
	4	
•		-
J4		2
•		KJ
Q107		83
	8	
	-	
	6	
	KJ2	

Tá Rói nú spældi hjartara frá borðinum, var Carl endaspældur. Hann mátti antin spæla hjartara til borðið ella spæla út frá kleyvaranum. Avbera væl spælt av Róa!

FM blandað pør

Spælt var í Bridgehúsinum í Havn 3. mars. Longu tíðliga í kappingini løgdu Gunna Midjord og Finn Ougaard seg á odda í kappingini. Tey megnaðu at halda støðuna og kundu eftir tey 39 spølini krúnast sum føroyameistarar fyri blandað pør 2000-01.

Vit ynskja tykkum báðum hjartaliga tillukku við hesum frálíka úrslitinum!

14 pør vóru við í kappingini, og sjey tey fremstu vóru hesi (barometer, miðal er 0 ella 50%):

1. Gunna Midjord - Finn Ougaard	54	61.54%
2. Marjun Restorff - Símin Lassaberg	4	60.04%
3. Henriette Svenstrup - Oddmar Danielsen	24	55.13%
4. Maria Christiansen - Marner Joensen	22	54.70%
5. Súsanna Dam - Hannis Jacobsen	17	53.63%
6. Arnleyg Mikkelsen - Carl Mikkelsen	16	53.42%
7. Ingibjørg Hansen - Atli Hansen	3	50.64%

FM lið

Finalu-umfarið í FM kappingini fyri lið verður spælt í Ósáskúlanum í Klaksvík fríggjakvøldið og leygardagin 23. og 24. mars. Byrjað verður at spæla klokkan 19.00 fríggjakvøldið, og hildið verður fram kl. 11.00 leygarmorgunin.

Sunnudagin 25. mars verður opin parakapping í Ósáskúlanum.

Gunna Midjord og Finn Ougaard vunnu FM í kappingini fyri pør

Liðið hjá Símin Lassaberg, sum vann steypafinaluna. F.v. Símin Lassaberg, Rói á Rógvu Joensen, Marner Joensen og Árni Dam

Liðið hjá Marjun Restorff. Taptu í finaluni. F.v. Eyðun Joensen, Marjun Restorff, Arnleyg Mikkelsen og Eyðun Jensen

Ársaðalfundurin

verður á loftinum í ÍSF-húsinum leygardagin 17. mars 2001 kl. 18.00.

Vit tosa um leyst og fast kring fótbóltslandsliðið.

12. Maður

HB best í Klaksvík

Liðini, sum vóru við í Klaksvík, tóktust troytt av nógvari og harðari venjing

KLAKSVÍKSKAPPING
Jóannes Hansen

HB fór sunnukvøldið úr Klaksvík við steypinum, sum Klaksvíkar Býráð hevur latið felgøunum at kappast um, tá tey fyrireka seg til nýggja kappingarárið. Nú er stórur spenningur um, hvør fer at vinna steypið til ognar. Reglurnar siga, at tað liðið, sum fyrst vinnur steypið fimm ferðir, eigur tað til ognar. Higartil hava KÍ og GÍ vunnið tað fýra ferðir í part, og HB sigurin sunnudagin var tann triði.

Hjá klaksvíkingum var hetta fyrsta høvi at síggja fótbólt í ár. Sjálandi var tað hugaligt í góðveðrinum at síggja nøkur av fremstu feløgunum í landinum, men vónandi verður dygdin í spælinum betri, tá tað verður størri álvari. Tað sást væl, at nógvir av evnaríkastu monnunum í landinum vóru á vøllinum. Men tað sást eisini væl, at teir vóru ikki so væl upplagdir, sum teir kunnu vera. Nógv og tung venjing og fleiri venjingardystir gera um seg. Skjótleikin, neyvleikin og hugflogið vóru ikki altíð í topp, og tað hevði felriri mistøk við sær, mne kortini var tað hugaligt.

KÍ vann leygardagin 2-1 á VB, og HB smurdi GÍ av 5-1. Nógv kend andlit vóru at síggja, men tað vóru eisini fleiri ungir spælarar á vøllinum, sum framman undan hava spælt millum lítið og einki í bestu deildini.

Klaksvíkingar kenna Marek Wierzbicki, men hetta var fyrsta ferðin, at teir sóu hann í VB búna. Marek skoraði VB málið móti KÍ. Talan var um beinleiðis frískpark. Nýggjur í VB búnanum var eisini Gisli Sveinbjørnsson, sum var ytstur í vinstru.

Eyðun Klakstein skoraði til 1-0 fyri KÍ, og Tomislav Sivic skoraði sigursmálið. Vágbingar hildu seg í síðstu løtu verða snýttir fyri brotsspark, men tað metti dómarin ikki.

Gøtumenn høvdu stórar trupulleikar í verjuni. Poul Ennigarð verður ein mánað afturat niðri á skúla, og Bartal Eliasen var upptikin av flogbóltinum. Hann er liðformaður hjá fuglfirðingum, sum leygardagin vunnu FM.

Hjá HB var Rókur Jespersen yngsti maður. Tað er ikki fyrr enn nú, at hann fær aldur at spæla vaksnamannafótbólt. Honum verður tað ivaleyst nógv at hoyra frá. Longu í fjør hevði HB fleiri ungar menn á liðnum, og tilfarið trýtur ikki. Allan Mørkøre og Hans á Lag eru skaddir, men ungir menn halda seg til. Eitt annað dømi um hetta er Bjarni Jørgensen, sum er sera evnaríkur.

Hóast unga aldur sín, so taldist Andrew av Fløtum millum royndastu menninar á HB-liðnum, sum um vikuskiftið vann klaksvíkskappingina

Mynd: Álvur Haraldsen

Finaludagurin

Sunudagin vann GÍ 3-1 á VB, og í finaluni vann HB 3-1 á KÍ. Í steðginum var 1-1. Nógvir ungir menn vóru á KÍ liðnum í vikuskiftinum. Hjalgrím Elttør er ungur, men hann fekk royndir á besta liðnum í fjør. Hann setti hol á fyri heimaliðið. Dygst undan steðginum javnaði Rúni Nolsøe upp á óneyðugt brotsspark. Í 2. hálvleiki vóru nógir møguleikar báðar vegir, men tað var bara HB, sum fekk mál.

Klaksvíkingar steðgaðu upp, tí teir mettu talan vera um rangstøðu. Rúni Nolsøe tóktist eisini at ivast í, hvussu hann var staddur, men hann gjørdi púra beint og trillaði bóltin í málið, og dómarin góðkendi. Fram móti dystarenda stútaði klaksvíkingurin, Rógvi Jacobsen, innlegg úr høgru upp um KÍ-málverjan.

Bent Larsen væl fyri

Eftir at størsti danski telvarin nakrantíð Bent Larsen brádd-liga í fjør gjørdist álvarsliga sjúkur, er hann nú frískur og luttekur aftur við sterkum kappingum.

TALV
Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Tað kom sum ein bumba tá Bent Larsen uttan varskóð bleiv innlagdur við veskusamling í heilanum. Hann hevði tá telva eitt talv í DM. Hann varð tó sera heppin, og tveir mánaðir eftir hendan tilburð fór hann troyttur men frískur yvir aftur til Argentina, har hann leingi hevur havt búðstað.

65 ára gamli Bent Larsen bleiv fyrsti danski stórmeistarin, og varð leingi millum fremstu telvarnar í heiminum. Hann hevur mangar sterkar kappingar vunnið í 60´unum og 70´unum, har eitt nú Spassky, Karpov og aðrir sterkir stórmeistarar eisini hava luttikið. Nógvan heiður hevur hann fingið, eitt nú valdur til næsterkasta telvara í heiminum í 1976. Síðani Curt Hansen í 1985 bleiv næsti danski stórmeistari, hava fimm aðrir fingið hendan tittul, og eru tað nú sjey danskir stórmeistarar.

Tað er tó ein heiður sum Bent Larsen manglar, nevnliga heimsmeistaraheitið. Hann fekk dyggan smeit tá hann í kappingini um at bjóða Boris Spassky av í 1969, tapti heili 6-0 ímóti Bobby Fischer, sum loksins vann á Spassky.

Ulf Andersson og Bent Larsen javnir

Í hesum døgum luttekur Bent í stórmeistarakapping í Argentina, har eitt nú fremsti sviin Ulf Andersson eisini luttekur. Telvað eru fýra umfør, og liggja danin og sviin javnir í toppstríðnum við trimum javnleikum og einum vunnum talvi hvør. Hetta má sigast at vera góð byrjan hjá Bent, sum ikki tykist at hava tikið skaða av heilatilburðinum fyri einum árum síðani.

Flóvin og Rógvi í Íslandi

Havnar Telvingarfelag og Talvfelagið Grandrokk í Reykjavík gjørdu í fjør avtalu sum inniber, at hevur eitt av hesum feløgum brúk fyri hjálp í eitt nú liðkappingini, kann tað lána telvara telvara úr vinarfelagnum.

Enn hevur Havnar Telvingarfelag ikki gjørt sær dælt av hesum, og hevur tað helst ikki verið neyðugt. Havnar Telvingarfelag vann jú FM í ár.

Hinvegin hava Flóvin Tór Næs og Rógvi W. Rasmussen, sum eru limir í Havnar Telvingarefelag, verið nakrar túrar í Íslandi. Talvfelagið Grandrokk er eitt sermerkt talvfelag. Telvað verður nevnliga í einari barr, nevnd Grandrokk. Felagið hevur ment seg nógv, í fjør vunnu teir 3. deild og í ár hjálptu føroyingarnir teimum at vinna 2. deild. Telvað verður bert í tveimum vikuskiftum í íslendsku liðkappingini, í november og mars.

Einstøku úrslitini hjá Flóvin og Rógva hevur ikki verið møguligt at fingið fatur á.

Danski stórmeistarin, Bent Larsen, hevur reist seg av sjúkraleguni, og tykist nú aftur at vera væl fyri

Talvið hesa vikuna

Roselli, B (2400) - Larsen, B (2500)
Magistral Internacional de Pinamar Viejo Hotel Ostende (2), 09.03.2001

1.e4 c5 2.Nf3 Nc6 3.d4 cxd4 (Bent Larsen hevur altíð verið talsmaður fyri sisilionskum frá svartari síðu, og sum hann sjálvur sigur so er tað altíð gott at fáa hvíta sentrumsfinnu fyri sína c-finnu) 4.Nxd4 g6 5.Nc3 Bg7 6.Nb3 d6 7.Be2 Nf6 8.0-0 0-0 9.Bg5 Be6! (betri enn tað passiva Bd7) 10.Kh1 Rc8 11.f4 a6 12.Rb1?! Na5 13.e5? (mistak. 13. f5 er betri alternativ) 13...Nxb3 14.axb3 dxe5 15.fxe5 Nd7 16.Bf3 b6? 17.Bd5? (17.Bb7 Rc7 18.Bxa6 Nxe5 19.Qe1 javnt spæl) 17...Nxe5 18.Bxe6 Qxd1 19.Rbxd1 fxe6 20.Bxe7 Rxf1+ 21.Rxf1 Nc6 22.Bh4 Nd4 23.Rf2 b5

(leggur trýst á c2, hvítur viknar tí støðuna. Larsen hevur enn stórdygdir í endatalvi og restin er teknikkur)
24.b4 Rc4 25.Be7 Nc6 26.Bd6 Nxb4 27.b3 Rc6 28.Bxb4 Bxc3 29.Bxc3 Rxc3 30.Kg1 a5 31.Kf1 a4 32.bxa4 bxa4 33.Ke1 a3 34.Kd2 a2 35.Rf1 Ra3 36.Ra1 e5 37.Kc1 e4 38.Kb2 Ra7 39.Kc3 Kf7 40.Kd4 Ra4+ 41.c4 Ke6 42.Kxe4 Rxc4+ 43.Kd3 Ra4 44.Kc3 Kf5 45.Kb3 Ra7 46.Kb2 Kg4 47.Kc3 h5 48.Kd3 h4 49.Ke3 h3 50.g3 Ra3+ 0-1